Starvslýsing

Heimatænastan

## Økisskrivari til Heimatænastuna Vágar/Norðstreymoy

Søkt verður eftir starvsfólki til økisskrivstovuna í Heimatænastuni at byrja 1. juli 2007 ella skjótast tilber at arbeiða fulla tíð ella eftir nærri avtalu. Økisskrivstovan virkar sum sambindingarlið ímillum brúkaran, starvsfólkið, Meginskrivstovuna og aðrar stovnar.

**Høvuðsuppgávurnar eru umframt vanligt skrivstovuarbeiði at:**

- Taka telefonina
- Gera lønir
- Gera arbeiðsætlanir
- Postavgreiðsla
- Jornalisering

**Fyrimunur er, um tú:**

- Hevur viðkomandi útbúgving og fyrisitingarligar royndir
- Hevur áhuga í at arbeiða við lønar og starvsfólkaviðurskiftum
- Hevur góðan telduførleika
- Er fleksibul og hevur evni at læra nýtt
- Hevur royndir innan almenna fyrisiting
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- Tolir møguligar bygnaðarbroytingar

**Lønar- og setanartreytir.**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er í løtuni Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy. Arbeiðsstaðurin er í løtuni við útgangsstøði frá Heilsumiðstøðini í Miðvági

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Sonju Klein, økisleiðara, á tlf. 333249/282249

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvi og viðmælum v.m. verður at senda til:

Heimatænastan Vágar/Norðstreym
Økisskrivstovan
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist:**
8. juni 2007 kl. 15.00

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Meginskrivstovan

## KT – leiðari

Nærverkið søkir eftir KT-leiðara til setan skjótast tilber.

Talan er um eitt nýtt, avbjóðandi og sjálvstøðugt starv, har høvuðsuppgávurnar eru skipan og menning av KT í Nærverkinum.

Nærverkið er skipað við Meginskrivstovu og 4 deildum. Virksemið er skipað um alt landið, og uml. 1400 persónar starvast í Nærverkinum. Í løtuni rekur Nærverkið virksemi fyri uml. 460 mió. kr. árliga. Nærverkið er í støðugum vøkstri, og stórar uppgávur liggja fyri framman. Nærverkið er farið undir miðvísa menning av stovninum, og sum ein liður í hesari menning hevur kunningartøknin ein avgerðandi týdning.

Nærverkið er eitt dynamiskt arbeiðspláss, har eingin dagur er eins. Økið hevur stóran almennan áhuga. Tú fært ávirkan og kemur í samband við nógv fólk, og tú hevur góðar møguleikar fyri førleikamenning.

**Vit hugsa okkum ein persón, ið:**

- hevur skil fyri og sær møguleikarnar fyri at samantvinna kunningartøknina við virksemið, ið fer fram í Nærverkinum
- hevur evni at skapa og framleiða vitan burtur úr kunningartøknini, ið kann nýtast sum grundarlag undir støðutakan og kunning
- hevur hegni til at skapa framtíðarloysnir og at seta hesar í verk
- er sjálvstøðug/ur
- hevur góð samstarvs- og samskiftisevni.

Nærverkið er stovnur, ið umsitur nógvar persónsupplýsingar. Tí er neyðugt, at tann, ið settur verður, í øllum setir trygdina í hásæti og arbeiðir miðvíst við hesum.

**Vit leggja eisini dent á, at tú:**

- Hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni so sum dátufrøðingur, verkfrøðingur, cand.merc.dat. e.l.
- Hevur royndir innan KT
- Hevur kunnleika til almenna fyrisiting
- Hevur málsligt hegni og dugir væl at orða teg skrivliga
- Ert praktiskur og tænastusinnaður.

Starvið er skipað við tilvísing til stjóran í Nærverkinum.

**Setanartreytir:**
Løn og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Setanarøkið fevnir um Nærverkið, tænastustaðurin í løtuni er Meginskrivstovan.
Meiri fæst at vita við at venda sær til Mary J. í Garði, stjóra, á tlf. 304020

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Eirargarður 2, 2. hædd
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Mary J. í Garði, stjóri

**Umsóknarfreist:**
Fríggjadagin 22. juni 2007

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



## Toy til skjúrt

Toy til skjúrt, ið er framleitt í Føroyum, fæst í litunum reytt/svart, reytt/blátt og blátt/blátt.

**Fæst í hesum handlum:**

- Norðoya Heimavirki
- Eysturoyar Heimavirki
- Skálabúðin
- Sonja Design
- Marjun Heimá
- Seymiskrínið
- Vágs Heimavirki

Mýrifipan
Telefon 31 43 35

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

## Lærlingar

Vit søknast eftir lærlingum til rørsmíð at byrja sum skjótast.

**Hógv Handilsvirki**
Oman á Sand 15 • FO-660 Søldarfjørður
Tel 470 400 • Fax 470 401 • hogv@hogv.fo




**Aðalfundurin verður í ÍSF-húsinum 12. juni, kl. 19. Skrá sambært lóg felagsins (innkomin mál skulu vera felagnum í hendi 10 dagar fyri fundin).**

**Nevndin**